## Maðurin á Havnarvág

Hósdagin varð ein maður tikin upp úr sjónum á Havnarvág. Tá maðurin kom upp hevði hann fult vit og tosaði við fólkini, ið hjálptu honum. Maðurin var øgiliga kaldur, men hevði tað eftir umstøðunum gott. Tá løgreglan tosaði við mannin var hann ikki sinnaður at greiða frá, hvussu hann var endaður á sjónum. Løgreglan veit eisini at siga, at maðurin ikki var ávirkaður av rúsdrekka ella rúsevnum. Maðurin var sæddur av landi, og sløkkiliðið í Havn gjørdi skjótt av at taka mannin upp.



## Koyrdi fullur í Vestmanna

Sunnunáttina var onkur í Vestmanna, ið skuldi longri enn hann ætlaði beinini skuldu bera hann. Maðurin hevði í hvussu so er sett seg í bilin, hóast hann hevði so mikið nógv innanborða, at hann ikki hevði loyvi til at koyra bil. Maðurin koyrdi inni í bygdini tá hann rendi á ein parkeraðan bil. Løgreglan kom á staðið, og blóðroynd var tikin av manninum, sum sá út til at vera rættiliga fullur. Enn er ikki staðfest, hvussu høg promillan hjá manninum var, men tað skilst, at maðurin kann rokna við at missa koyrikortið í tvey til trý ár, og er promillan hægri enn tvey, kann maðurin eisini rokna við fongsulsrevsing.

# Lív fekk lívið aftur í sk



*Tá Lív var 13 ár, dugdi hon nóg illa at skriva sítt egna navn. Heldur ikki kendi hon mánaðirnar í árinum, dagarnar í vikuni ella klokkuna, og hon kundi ikki fortelja, nær hon hevði føðingardag*

**22 ára gamla Lív Poulsen dugdi hvørki at skriva ella at rokna, tá hon fór úr fólkaskúlanum. Men nú hon hevur gingið í skúlanum við Áir í hálvtannað ár, fær hon bæði 10 og 11 tøl**

ÚTBÚGVING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Lív er eitt av hesum børnunum, sum ongantíð hevði yvirskot til at læra. Uppvaksin í einum heimi við vanrøkt og rúsdrekkamisnýtslu, blokeraði lítla Lív fyri læring, bæði á dagstovni og seinni eisini í skúlanum. Heima varð hon ikki stimbrað, og foreldrini høvdu nógvar sosialar, fakligar og persónligar trupulleikar at dragast við.

Úrslitið var, at Lív sum 13 ára gomul varð tikin úr heiminum og sett í fosturfamilju úti á bygd. Tá dugdi hon nóg illa at skriva sítt egna navn. Heldur ikki kendi hon mánaðirnar í árinum, dagarnar í vikuni ella klokkuna, og hon kundi ikki fortelja, nær hon hevði føðingardag.

- Eg minnist meg sjálva sum bangna. Og eg var ein sannur meistari í at látast og fann upp á allar møguligar útvegir, so ongin skuldi avdúka, hvussu illa eg í veruleikanum var fyri. Tí vóru tað bara tey, sum kendu meg allarbest, sum vistu av tí, sigur Lív Poulsen. Í dag gongur hon í Alv skúlanum við Áir, har fólk yvir 18 ár kunnu taka 9. flokk og FHS.

### Bjargað av góðum fólki

Tað er eisini her vit hitta Lív Poulsen til eitt prát. Hon hevur valt at siga okkum søgu sína, tí hon vónandi kann geva vón til teirra, sum av einhvørjari orsøk ikki fingu tað burtur úr skúlanum, sum krevst fyri at fáa eina útbúgving.

- Í mínum føri endar søgan væl, tí eg havi havt nógv góð fólk um meg. Bæði pedagogar, lærarar, vinir, starvsfelagar og fosturfamiljan hava øll verið so ótrúliga góð við meg. Men eg lærdi onki, og tað var ikki tí, tey ikki royndu, sigur Lív Poulsen, sum tó heldur, at størsta stuðulin hevur hon fingið frá samkomuni Keldúni, har hon hevur verið virkin síðstu árini.

- Har havi eg upplivað ein serligan stuðul, sum heilt sikkurt hevur ment og búnað meg nógv, so eg nú kann taka ímóti lærdómi, sigur Lív Poulsen, sum hevur arbeitt og ferðast nógv, síðan hon bleiv liðug í skúlanum.

Sum 15 ára gomul fekk hon arbeiði á Sjómansheiminum í Havn, og síðan eisini Hotel Hafnia. Í dag arbeiðir hon í Lampubúðini í Havn, og alla staðni hevur hon klárað seg strálandi, tí hon er sera ábyrgdarfull og dámar væl at arbeiða.

- Eg kundi gera alt tað praktiska, og so leingi eg ikki skuldi skriva ella rokna gekk tað fínt, sigur hon, og fegnast um góðu stjórarnar, sum hon hevur arbeitt undir.

- Teir hava verið heilt fantastiskir, tí teir hava víst mær álit, og hjálpt mær við tí bókliga, tá eitthvørt hevur verið, sigur hon.

### Ringast var bólkaarbeiði

Men øll árini í fólkaskúlanum kendi Lív Poulsen seg sum eina byrðu. Hóast skúlin vildi henni tað besta og